**Høgni Hoydal**
**løgtingsmaður**

**Nr. 33/2019**

**Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a**

**Fyrispurningur um samskifti við útlendskar myndugleikar og avgerðir um mál av stórum uttanríkispolitiskum týdningi, har eingin ráðførsla hevur verið í Løgtingsins Uttanlandsnevnd, settur løgmanni (at svara skrivliga eftir TS § 52a)**

1. Hví hevur eingin ráðførsla verið í Løgtingsins Uttanlandsnevnd, nú samskifti og fundir hava verið við kinverskar og amerikanskar myndugleikar um viðurskifti av stórum uttanríkispolitiskum týdningi fyri Føroyar í sambandi við útbygging av 5G-teleneti – og heldur løgmaður, at hetta er í samsvari við § 54 í løgtingslóg um stýrisskipan Føroya?
2. Hví hevur eingin ráðførsla verið í Løgtingsins Uttanlandsnevnd, nú landsstýrismaðurin í uttanríkismálum boðar alment frá, at avgerðir verða tiknar um Hoyvíksssáttmálan millum Føroyar og Ísland í hesi vikuni, ið hava stóran uttanríkispolitiskan týdning fyri Føroyar – og heldur løgmaður, at hetta er í samsvari við § 54 í løgtingslóg um stýrisskipan Føroya?
3. Hví hevur eingin ráðførsla verið í Løgtingsins Uttanlandsnevnd, tá ið landsstýrismaðurin í uttanríkismálum í altjóða fjølmiðlum boðar frá, at Føroyar skulu lata upp sendistovu í Jerusalem – og heldur løgmaður, at hetta er í samsvari við § 54 í løgtingslóg um stýrisskipan Føroya?
4. Hví hevur eingin ráðførsla verið í Løgtingsins Uttanlandsnevnd, nú løgmaður boðar alment frá, at fundir og samskifti hava verið við danskar myndugleikar, og avgerðir eru tiknar um hernaðarligan radara í Føroyum – og heldur løgmaður, at hetta er í samsvari við § 54 í løgtingslóg um stýrisskipan Føroya?

**Viðmerkingar**

Kappingin um vald, pening og áhugamál hjá heimsins tjóðum, stórveldum og altjóða fyritøkum er farin inn í nýtt stríð. Um okkara leiðir eru bæði hernaðarlig áhugamál, búskaparlig áhugamál og vinnulig áhugamál støðugt vaksandi hjá heimsins stórveldum og stórkapitali – ikki minst í sambandi við veðurlagsbroytingar, nýggjar siglingarleiðir og náttúrutilfeingi í Norðuratlantshavi og Arktis.

Danmark roynir í sínum lagi at varðveita sítt vald og síni áhugamál yvir Føroyum og Grønlandi og tvíheldur um, at tey eiga avgerðarrættin, og at føroyingar bert skulu "kunnast og takast við upp á ráð". Tað hevur tí ongantíð verið týdningarmeiri, at Føroyar taka ábyrgdina og ræðið í egnum landi, og at vit røkja okkara egnu áhugamál í heiminum í samstarvi við heimsins tjóðir.

Tí er tað við miklari undran at vit, sum eru vald at umboða Føroya fólk á Løgtingi, frætta um viðgerðina hjá landsstýrinum av málum, ið hava alstóran uttanríkispolitiskan og tjóðskaparpolitiskan týdning fyri Føroyar.

Alt hetta fer fram, uttan at landsstýrið hevur ráðført seg við Uttanlandsnevndina hjá Løgtinginum, sum ásett er í § 54 í Stýrisskipan Føroya.

Hendan áseting í lóg hevur tað greiða endamál, at tá ið ræður um áhugamálini hjá føroysku tjóðini mótvegis umheiminum, eigur alt at gerast fyri at fáa semjur og undirtøku fyri tí leið og teimum avgerðum, ið skulu takast.

Í løtuni bendir alt á, at landsstýrið í fyrsta lagi letur uttanríkispolitikk Føroya og tjóðskaparpolitisku áhugamál føroyinga gerast eitt partapolitiskt spælipláss hjá einstøkum politikarum at leika sær á til persónligt uppmerksemi.

Verður farið fram soleiðis, missa vit tjóðskaparpolitisku áhugamálini av hondum og gerast uppaftur størri finna í stórpolitiskum og persónligum talvum, sum ikki gagna føroysku tjóðini á nakran hátt.

Tí verða hesir spurningar settir løgmanni.

**Á Løgtingi, 6. desember 2019**

Høgni Hoydal